# Suðuroyingar kunnu vænta arbeiðsboð um eina góða viku

**Gongst sum ætlað, letur flakavirkið hjá Jákup Joensen í Lopra upp um eina góða viku. Men stjórin heldur, at kappingin er so hørð, at tað er neyðugt at seta førleikakrøv til arbeiðsfólkið**

NÝTT VIRKI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Um eina góða viku kunnu suðuroyingar vænta sær arbeiðsboð á einum nýggjum virki.

Tað er ætlanin hjá Jákupi Joensen í Lopra, sum nú er komin so mikið áleiðis, at tann dagurin nærkast í stórum, at virkið er klárt at taka ímóti fiski.

Jákup Joensen sigur, at hann hevur sett sær sum al at taka ímóti fiski 1. apríl.

– Tað er okkurt lítið eftir at gera á virkinum, áðrenn tað er klárt, men væntandi verður virkið liðugt 1. apríl, sigur hann.

Ta fyrstu tíðina verður Jákup Joensen sjálvur stjóri á virkinum, men sum frá líður, ætlar hann at finna onkran annan at reka tað.



*Gongst sum ætlað, fer Jákup Joensen at senda boð eftir arbeiðsfólki á nýggjum flakavirki í Lopra um eina góða viku*

Á virkinum verður brúk fyri 25-30 fólkum og tað stendur ikki á at fáa fólk, tí fólk hava staðið rættiliga leingi á bíðilista.

Framleiðsluførleikin á virkinum verður eini 20 tons av lidnari vøru um vikuna. Sostatt fer virkið at taka ímóti einum 40 tonsum av fiski um vikuna, ella gott tað.

– Men tað veldst alt um, hvussu tað fer at liggja fyri at fáa fatur á fiski, leggur hann afturat.

Fiskin ætlar hann at keypa á uppboðssøluni.

– Ætlanin er at hetta skal vera eitt flakavirkið, men sum flutningssambandið er, liggur ikki so væl fyri við tí feska í Suðuroy og tí fer virkið væntandi at leggja fult so stóran dent á fryst fløk.

Annars hevur Jákup Joensen rættiliga góðar vónir um, at hetta flakavirkið fer at bera seg.

Virkið áttu tey framman-undan og Jákup Joensen hevur sjálvur arbeitt við at gera tað klárt at taka ímóti fiskið, so útreiðslurnar hava verið rættiliga avmarkaðar.

Arbeiðsfólkið á nýggja flakavirkinum í Lopra verður úr nærumhvørvinum har suðuri.

Og Jákup Joensen heldur, at føroyingar skulu eina fyrsta rætt til tað arbeiði, sum er í Føroyum.

Men í tann mun, tað ikki ber til at fáa arbeiðsfólk á staðnum, eigur eitt virkið at kunna fáa útlendska arbeiðs-megi.

Tað hevur verið eitt sindur frammi um, at flakavinnan hevur trot á arbeiðsfólki.

Hann kennir ikki nóg nógv til málið og veit tí ikki, hvussu tað ber til at tað manglar arbeiðsfólk.

Men hann heldur, at ein spurningur, sum ger seg galdandi í hesum føri, er, hvussu støðugt arbeiði, flaka-virkið kann útvega.

### Førleikakrøv til flakafólk

Jákup Joensen hevur fyrr borið upp á mál, at tað er neyðugt at seta førleikakrøv til tey, sum skulu arbeiða á virkinum.

Og tað heldur hann fram-vegis.

– Kappingin í flakavinnuni er so stór, at tað er neyðugt at seta førleikakrøv til tey, sum skulu arbeiða á einum flakavirkið.

– Tað merkir, at eitt minstamark má vera fyri, hvussu nógv virkið skal virka fyri hvørt starvsfólk.

– Tímalønin er rættiliga høg og tí er neyðugt at virkið er effektivt, tí annars verður framleiðslan ov dýr.

Tì sigur Jákup Joensen, at hann hevur sett sær sum mark, at hvør reinskerari eigur at kunna virka eini 60-65 kilo um tíman.

- Men tað veldst alt um, hvat slag av framleiðslu, talan er um, og, hvussu støðd-in er, leggur hann afturat.

– Er talan um stóran fisk, gongur meiri ígjøgnum, men skera vit beinfrítt flak, minkar tað bæði um úrtøkuna og um nøgdina ið kann fara ígjøgnum.

Men hann leggur dent á, at hetta setir ikki bara krøv til arbeiðsfólkið. Tað setir eisini krøv til virkisleiðsluna, at allar maskinur eru so væl stillaðar sum gjørligt, at knívarnir so hvassir, sum gjørligt og at alt annars riggar, sum tað skal.

---

# Arbeiðsmenn í Klaksvík krevja sama rætt sum øll hini

**– Í eitt heilt ár hava arbeiðsmenn í Klaksvík havt verri sømdir enn øll onnur arbeiðsfólk í landinum, men tað vilja teir nú hava í rættlag**

SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðsmenn í Klaksvík vilja nú hava somu sømdir sum æll onnur arbeiðsfólk í Føroyum.

Tað hava arbeiðsmenninir í Klaksvík nevniliga ikki havt í eitt heilt ár.

Í eitt heilt ár hava arbeiðsmenninir í Klaks-vík fingið minni í eftirløn og lívstrygging frá arbeiðs-gevarunum enn øll hini arbeiðsfólkini í Føroyum hava fingið.

Í fjør søgdu øll arbeið-arafeløgini sáttmálan upp og samráddust við arbeiðs-gevararnar um ein nýggjan sáttmála.

Tað endaði við einum sátt-mála, sum gav arbeiðsfólki eina hækking í eftirløn og lívstrygging.

Men Klaksvíkar Arbeiðs-mananfelag vildi ikki siga sáttmálan upp og tí helt teirra sáttmáli fram óbroyttur.

Sostatt hava Klaksvíkingar í eitt heilt ár fingið minni í eftirløn og lívstrygging enn øll hini hava fingið. Men høvdu teir heldur ikki sagt sáttmálan upp í ár, høvdu teir verðið enn meiri afturútsigldur.

Men nú hevur Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag sagt sáttmálan upp við arbeiðs-gevararnar og sum tað ein-asta arbeiðarafelag í land-inum, skulu teir sostatt til samráðingar um ein mánað.

Sáttmálin gongur út 30. apríl og Jóhan Andrias Reyðberg, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, sigur, at enn hava ongar samráðingar verið.

Men hann sigur, at enda-málið er heilt greitt, at koma upp á sama støðið sum øll hini arbeiðsfólkini í landinum.

– Nú hava vit verið verri fyri enn øll hini feløgini í eitt ár, men tað gerst so ikki við og nú er at líta frameftir.

Hann væntar ikki, at tað verður nakar trupulleiki hjá Klaksvíkar Arbeiðsmanna-felag at fáa tað sama sum øll hini.

– Vit mugu royna at fylgja við øllum hinum, leggur hann afturat.

Sjálvur heldur hann, at tað var skeivt av Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag ikki at siga sáttmálan upp í fjør saman við øllum hinum arbeiðarafeløgunum, tí hann heldur avgjørt, at øll arbeiðarafeløgini eiga at samstarva.

– Ì mínum hugaheimi er tað sjálvsagt, at øll feløgini fara at samráðast saman næstu ferð, at samráðingar vera, sigur Jóhan Andrias Reyðberg.



*Endamálið hjá okkum er at koma upp á sama støðið, sum øll hini arbeiðsfókkini í Føroyum og næstu ferð, eiga vit øll at samráðast saman, heldur Jòhan Andrias Reyðberg, nývaldur formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag*

## Stutt um sátt-málar

Í fjør gjørdu øll arbeið-arafeløgini í landinum, uttan Klaksvíkar Arbeiðs-mannafelag, nýggjan tvey ára sáttmála við arbeiðsgevararnar.

Sáttmálin bar í sær, at 1. mai í fjør hækkaði eftirlønin 0,5%, so at hon nú er 4,1%. Samstundis hækkaði lívstryggingin 0,5%, so at hon nú er 1,5 %. 1. mai í ár hækkar eftirlønin aftur 2 % og tá verður hon 6,1%.

Hesar ágóðar hava Arbeiðsmenn í Klaksvík ikki fingið av tí at teir ikki søgdu sáttmálan upp.